# Landsfelag Pensjónista

Argir 9. des. 2019

## Til fjølmiðlarnar og politisku flokkarnar

## Viðmerkingar til broytingar í pensjónslóggávuni

**Í morgin týsdagin 10. des. koma pensjónsuppskotini hjá landsstýrinum til 2. viðgerð í Løgtinginum.**

Landsfelag Pensjónista hevur við hoyringssvari til Almannamálaráðið og á fundi í Løgtingsins Trivnaðarnevnd greitt frá sínum sjónarmiðjum í sambandi við ætlaðu broytingarnar innan pensjónslóggávuna: Løgtingsmál nr. 10, 11 og 20/2019.
Endamál landsstýrisins við uppskotunum er at betra fíggjarligu viðurskiftini hjá fólkapensjónistum og at gera treytirnar lagaligari hjá teimum fólkapensjónistum, sum umframt pensjónini hava eyka inntøkur.
Ávísar betringar eru í samlaða pensjóns-lógarpakkanum hjá nýggja landsstýrinum, har t.d. mótrokningarprosentið verður lækkað, og har ein skattafrádráttur er, áljóðandi 500 kr./mð., sum vit taka undir við (hetta er uppskotið, sum snýr seg um ein árligan skattafrádrátt áljóðandi 6.000 kr).

**Arbeiðsáhugin minkar**
Tó er Landsfelag Pensjónista vónbrotið, tá tað kemur til at betra um viðurskiftini hjá pensjónistum, ið ynskja at arbeiða.
Tað er, tá vit hyggja at uppskoti landsstýrisins, har frádráttarfría inntøkuupphæddin verður lækkað úr ávikavist 61.900 kr. og 60.000 kr. heilt niður til 40.000 kr. Lækkingin førir við sær, at áhugin hjá pensjónistum at arbeiða minkar. Hetta serstakliga pensjónistar, ið forvinna sær eina minni inntøku afturat pensjónini, sum grafur 1 vísir.



Vit síggja, at verandi pensjónistar, sum fáa minst, eru teir, ið hava eina inntøku uppá 60.000 kr. afturat pensjónini. Hesir fáa við nýggja lógaruppskotinum einans 868 kr./mð. Tað er slett ikki í samsvar við tað, vit annars hoyra í fjølmiðlunum, nevniliga, at pensjónistarnir fáa 1080 kr. meira um mánaðan. Hetta samstundis, sum teir pensjónistar, ið hava eina inntøku uppá 140.000 kr./ár, fáa eina hækkan uppá 2.416 kr./mð., tvs. næstan tríggjar ferðir so nógv. Vit hava onki ímóti, at hesir fáa eina hækkan, men tað er órímiligt, at pensjónistar við eini lágari inntøku fáa minst.

**Uppskotið mótsatta ávirkan**

Tá vit so hyggja eftir teimum, ið verða pensjónistar eftir 1. jan. 2020, er støðan enn meira óskiljandi, sum sæst á grafi 2.




Ein pensjónistur, ið hevur eina inntøku uppá 375.000 kr./ár, fær eina hækkan uppá 2.292 kr./mð. Hetta er meira enn tríggjar ferðir so nógv sum tað, ein fær við eini inntøku uppá 60.000 kr., har hækkingin einans er uppá 747 kr./mð.

Um man skal eggja pensjónistum at arbeiða eitt sindur eftir pensjónsaldur, so ger hetta uppskotið tað mótsatta við mótrokningini frá 40.000 kr., hóast mótrokningarprosentið er lækkað.

Undan valinum ljóðaði tað sum, at bæði Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin tóku undir við ynskjunum hjá Landsfelag Pensjónista at hækka frádráttarfría inntøkumarkið upp til 100.000 kr. fyri at eggja pensjónistum at arbeiða, men tað er helst gloymt.

Vit kunnu vísa á, at í Danmark varð inntøkumarkið hækkað úr 30.000 kr. upp í 100.000 kr. á nýggjárinum 2019, og er tað longu aftur hækkað upp í 122.000 kr., galdandi afturvirkandi frá 1. jan. 2019. Hetta, tí samfelagið hevur brúk fyri, at pensjónistar eru á arbeiðsmarknaðinum.

**Føroyar brúk fyri arbeiðsmegi**
At landsstýrið ger tað beint mótsatta, er óskiljandi fyri okkum, tí í Føroyum er eisini brúk fyri arbeiðsmegi. Landskassin og kommunurnar fáa jú skattainntøkur, tá pensjónistar eru á arbeiðsmarknaðinum.

Landsfelag Pensjónista mælir løgtinginum at broyta lógaruppskotið við hesi skeivu sosialu fordeilingini, soleiðis at peningur m.a. verður latin til teir pensjónistar, ið eru í fátækraváða. Vit hava í dag 2.500 pensjónistar, ið eru í fátækraváða, og eiga teir at lyftast upp.

Vegna

Landsfelag Pensjónista
Beate L. Samuelsen, forkvinna